# Heilsanir



**Góði Benny**
Nú gert tú piparsveinur 2 juni, her á mynduni, stendur tú í London og droymir um konubein, men stakkalin hevur bert voksfigurar at røra við. Vit gleða okkum til dagin.
**Svágur tín**



**Góði piparsveinur Benny við Sandá**
Ja tú hevur roynt og roynt, men tíverri eydanðist tað tær ikki at finna damuna áðrenn tú fylti 30 ár 2 juni. Men tú fekk loyvi at fáa eina mynd av tær og Susan K, sum tú ert so errur av. Hjartaliga tillukku við degnum, við ynski um at tú finnur eina damu ein dag.
**Heilsan Daisy**



**Góði fitti Benny við Sandá**
Nú verður tú 30 ár 2. juni, og gert sostatt PIPARSVEINUR. Hopi at tú fært eina damu, men lær teg fyrst ikki at hála buksirnar so langt upp. Gott ball.
**vh Daisy**



**Góði fitti Benny mamba**
Kenni ein piparsveinur hevur eingin damubein.. Nú er ov seint, mikudagin 2. juni fært tú PIPAR.
**Jeanette**



**Góði fitti lítli beiggi Benny við Sandá**
Tillukku við 30 ára degnum, og ikki minst piparsveina heitinum. Her vart tú heilt black and white, og vart kosin ársins grýla.
**Heilsan systur tín við familju**



**Til allar damur**
So verður hesin lekri karlurin 30 ár 2. juni. Hárið er ikki so stórt longur nú man er vorðin eldri, men nú hárið er rokið eru vøddarnir blivnir størri eftir sera harðari venjing í áravís.
**Tillukku Benny, ynskja vit**



**Góði fitti lítli beiggi**
Eitt stórt tillukku við 30 ára degnum. Hevði ikki vænta, at tú fórt at blíva ein piparsveinur, tú sum vært so vælumtóktur millum genturnar sum smádrongur. Men vit gleða okkum at feira teg.
**Alt tað besta, systur tín**



Øllum tykkum sum gleddu okkum á 45 og 50 ára føðingardøgunum, ið hildin var 10. apríl, tann dagin, har vit eisini gingu saman í hjúnarlag, takka vit hjartaliga. Hjartans tøkk til øll, sum við heilsanum, sangum, talum og gávum, gjørdu okkum dagin góðan og minniligan. Eisini takka vit hjartaliga fyri góða hjálp, í samband við dagin.
**Blíðar heilsur**
**Halljón Dam og Elsa Annika Dam Olsen, Norðskála**

# Tiltøk

**Samkoman Immanuel. Brekkutún 5, Hoyvík**
Mikukvøldið kl. 20 Møti. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Bergur D. Joensen evni: Matt 18.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Sólbjørg Símunarson, Argir

**Fríkirkjan Oasan, Kirkjustræt**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 19 After8,
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Vitnimøti, Torbjørn Láadal leiðir, kl. 12 sunnudagsskúli.

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og lærumøti. Einar Vang talar. Dópur verður á møtinum.
Hósdag kl. 12.30 Andakt
kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing er meðan møti er.
kl. 12 Sunnudagsskúli.
kl. 18 Evangelisktmøti.
Barnaansing er meðan møti er. www.ebenezer.fo

**Matiné í Havnar kirkju**
Leygardagin kl. 11.30.
Agnar Lamhauge, kontrabas. Jóhannes Andreasen, klaver.

**Lívdin**
Fríggjakvøldið og leygarkvøldið Alive eru avlýst, orsakað av Fjarðafestivalinum

**Frelsunarherurin Tórshavn Tórsgøta 19**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti
kl. 19 cellugruppa fyri menn.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Andras Biskupsstøð.

**Samkoman Marknagil**
*Fjalsgøta 2, Tórshavn*
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Kl. 18 Evangeliskt møti.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikukvøldið Kl. 20 Meinigheitshúsið fyllur 25 ár Lovsangur og bøn
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Pól Johannesen Ung í søkja Gud í bøn og bíbliulesnaði

**Hoyvíkar kirkja**
Sunnudagin kl. 16 fara strúkaranæmingar í Musikkskúlanum at hava konsert í Hoyvíkar kirkju. Øll vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikukvøldið kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
Hóskvøldið kl. 19.30 í KFUK: Bíbiltími
Sunnudagin Seinnapartsamkoman og varðmenn fara útferð til Gjáar. Tilmelding neyðug á tlf. 311928 og 211824. Ring 211824 og hoyr nærri.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudag kl. 18 er Evangelisk møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia Tórshavn**
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum.
Fríggjakvøldið kl. 20 mammur samlast til bøn.
Leygarkvøldið kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við familjumøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími Efes. 5,1-14. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskíli. Kl. 18 møti v/Klæmint Sólsker og Niels Jóhannes Tjaldrastein. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Mikukvøldið kl. 20 er sang- og bønarløta.
Sunnudagin er sunnudagsskúli kl. 14 og møti kl. 18 Manskórið luttekur.

**Glæman í Kvívík**
Sunnukvøldið kl. 18 verður sangmøti í Glæmuni í Kvívík við Húskórinum í Vestmanna o.ø. Aftaná verður drekka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur á Svarbakstind sunnudagin 6. juni. Vit møtast norðanfyri rundkoyringina við Norðskálatunnilin kl. 14. Túrurin er tungur. *Nevndin*

**Keldan, Skálafirði**
Fjarðafestivalurin verður settur hóskvøldið kl. 20. Heldur fram fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Sí skánna á www.fjardafestival.com
Sunnudagin kl. 11, Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl 11. Vælkomin í Kelduna.

**Tjørnuvík**
Leygarkvøldið kl. 19 verður útimøti í Tjørnuvík við Útimøtibólkinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti. Kl. 20.30 Ungdómsmøti.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin kl. 6 Bøn
kl. 20 Bíbiltími verður heima hjá Óla Finnsson.
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti v/Jónsvein Simonsen. Evni: Heilagi andi.
Sunnudag kl. 17 Felagsmøti v/Jóhannes Johannesen úr Klaskvík. Evni: Gleðir og sorgir í familjuni. Streingjakór lutekur, innsavnan og drekka.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Richard Danielsen talar. Evni: Rómbrævið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 19.30 samlast dreingja og gentubólkarnir
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti v/ Jónfríðu Justesen

**KFUM & K í Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Hjørleif Poulsen, Malakia profetur.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Hóskvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti.
Leygarkvøldið frá kl. 20 - 03.00 Lovsangs/Bønarløta
Sunnukvøldið kl. 18 Møti og sunnudagsskúli.

**Frelsunarherurin Vágur**
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta
Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið

**Tvøroyrar kirkja**
Fríggjakvøldið kl. 19 hevur Kristiliga sangkórið eina sangløtu í kirkjuni.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 verður sunnudagsskúli. Kl. 18 møti við Jónsvein Bech, presti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*Tlf: 316491/286491*
*tilhald@torshavn.fo*
*Opið er mánadag til hósdag kl. 09-17 og fríggjadag kl. 09-16. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
° Nú Tilhaldið hevur fingið rógvumaskinu o.o. amboð verður byrjað við vegleiðing av hesum amboðum, týs- og hósdag kl. 9. Instruktørur verður Arnhold Fjallstein. Tilmelding: 316491.
Hósdagin
Kl. 9 Vegleiðin av rógvumaskinu o.ø amboðum Arnhold Fjallstein. Tilmelding: 316491
Kl. 10 Fimleikur, Greta Ellingsgaard
Kl. 14 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
Fríggjadagin
Kl. 9 Bindiklubbur vit halda til á veghæddini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 14-16 Prát.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Føroya Felagið í London**
Føroysk summargudstænasta verður i London sunnudagin 6. juni í donsku kirkjuni kl. 14.30. Prestur - Heri Jogvan Joensen.Tað er í -The Danish Church, 4 St. Katharine's Precinct, London NW1 4HH, meira a www.danskekirke.org Fyrst verður sjalvtøkuborð/lunch frá kl. 12.30 og kl. 14.30 kirkjugongd, so verður kaffi og kakur aftaná kirkjugongdina. Øll eru vælkomin og um til ber er best at tekna seg hjá formanninum Ottar - ottar_schroter_holm@hotmail.com tel. 07762818985